Tjóðskjalasavnið

# Rundskriv um fráboðan og góðkenning av kt-skipanum

Sambært § 8 a, stk. 3 í løgtingslóg nr. 49 frá 28. apríl 1992 um skjalasøvn, sum broytt við løgtingslóg nr. 63 frá 30. apríl 2018, verður ásett:

*Øki*

**§ 1**

Ásetingarnar í hesum rundskrivinum eru galdandi fyri allar kommunalar myndugleikar og landsmyndugleikar í Føroyum (hereftir nevndir stovnar).

**§ 2**

Ásetingarnar í hesum rundskrivinum eru galdandi fyri kt-skipanir, ið verða nýttar til savnan og goymslu av upplýsingum, sum eru gjørdar ella fingnar til vega í sambandi við virksemið hjá einum stovni (talgilt fyrisitingarligt tilfar).

*Stk. 2.* Ein kt-skipan (hereftir nevnd skipan) skal skiljast sum ein skipað goymsla av dátum, umframt møguliga eisini talgild skjøl hjá stovninum.

**§ 3**

Brúksøki fyri skipanir skulu, sum ásett í § 2, vera bólkað og avmarkað eftir evni.

*Stk. 2.* Fyri skipanir við skjølum skulu hesi krøv harafturat vera lokin:

1) tað skal vera ein greið skipanar- og evnisavmarking av teimum økjum, har brúkt verður ávikavist pappírsskjalagoymsla og talgild skjalagoymsla

2) skifti frá pappírsgoymslu til talgilda skjalagoymslu skal vera galdandi fyri øll skjøl og mál innan fyri viðkomandi øki og skal fremjast sama dag.

*Fráboðan*

**§ 4.**

Stovnar skulu boða Tjóðskjalasavninum frá nýggjum skipanum, sum nevnt í § 2, í seinasta lagi 3 mánaðir, áðrenn skipanin verður tikin í nýtslu.

**§ 5.**

Skipanir, sum longu eru góðkendar, skulu bert fráboðast, tá ið munandi broytingar henda, t.d.

1) broyting í skrásetingarmannagongd í skipanum við skjølum
2) munandi broytingar av nýtsluøkinum hjá skipanini, so sum ábyrgdarbroytingar/ressortbroytingar í fyrisitingini
3) munandi broytingar í skrásetingarbygnaði og innihaldi í skipanum við skjølum
4) fult ella lutvíst skifti til talgilda skráseting av skjølum

**§ 6.**
Skipanir, sum skulu brúkast av fleiri myndugleikum, skulu fráboðast av tí myndugleikanum, sum stendur fyri íverkseting, menning og viðlíkahaldi av skipanunum.
*Stk. 2.* Í sambandi við fráboðan av skipanum, sum nevnt í stk. 1, skal ásetast, hvørjir myndugleikar hava ábyrgd av at røkja økið viðvíkjandi skjalasavnindum og avhending til Tjóðskjalasavnið.

**§ 7.**
Landsmyndugleikar skulu boða Tjóðskjalasavninum frá skipanum, sum verða brúktar bæði av lands- og kommunalum myndugleikum/stovnum.
Stk. 2. Skipanir, har ein landsmyndugleiki hevur tann fyrisitingarliga myndugleikan og/ella hevur dátuábyrgd av skipanini, skulu fráboðast Tjóðskjalasavninum sbrt. reglunum fyri skipanir hjá landsmyndugleikum, sum eru ásettar í hesum rundskrivi.

**§ 8.**
Fráboðan skal gerast við fráboðanaroyðublaðnum hjá Tjóðskjalasavninum.
Stk. 2. Við fráboðanini skal fylgja núverandi skjalfesting, so sum tabell- og kolonnulýsingar, møguliga sum eitt uppkast.

**§ 9.**
Myndugleikin skal, sum nevnt í § 1, boða frá afturlítandi skanning av talgildum varðveitingarverdum samgildum savnindum, um so er, at tey samgildu savnindini ynskjast at verða burturbeind eftir at vera gjørd talgild.
Stk. 2. Fráboðan um talgild savnindi, sum nevnt í stk. 1, skulu gerast við fráboðanaroyðublaðnum hjá Tjóðskjalasavninum.
Stk. 3. Fráboðanin skal sendast Tjóðskjalasavninum, áðrenn talgildingin byrjar.

*Varðveiting og vraking*

**§ 10.**
Í sambandi við fráboðan tekur Tjóðskjalasavnið avgerð um, hvørt innihaldið í skipanini skal varðveitast ella vrakast.
*Stk. 2.* Í skipanum við skjølum kann myndugleikin biðja Tjóðskjalasavnið gera eina fyribils meting um vraking av talgildum skjølum, tá ið skipanin verður tikin í nýtslu.

**§ 11.**
Skipanir, hvørs innihald avgerð er tikin um at verða vrakað, skulu ikki góðkennast av Tjóðskjalasavninum.

**§ 12.**
Vraking av samgildum savnindum, ið eru verd at varðveita, má ikki fara fram, fyrr enn góðkenning frá Tjóðskjalasavninum er fingin. Hesi skulu skannast ella á ein ella annan hátt talgildast, sbrt. § 9, áðrenn vraking kann fara fram.

*Góðkenning*

**§ 13.**
Skipanir, hvørs innihald er ætlað til savnindi, sbrt. § 10, skulu góðkennast av Tjóðskjalasavninum.

**§ 14.**
Áðrenn ein skipan kann verða góðkend, skal myndugleikin veita nøktandi skjalfesting, um so er, at skjalfestingin ikki er latin inn í sambandi við fráboðanina.

*Stk. 2.*Við nøktandi skjalfesting skilst

1) tøknilig skjalfesting sum tabel- og kolonnulýsing: E/R-diagram og skjalfesting av, at framleiðast kann ein skjalasavnsútgáva í einum relatiónellum sniði
2) fyri skipanir við skjølum: uppkast til vegleiðing fyri nýtslu av skipanini, sbrt. § 28.

*Stk.3.* Tjóðskjalasavnið kann seta krøv til format (snið, skap, stødd) og góðsku av skjalfesting.

**§ 15.**
Fyri skipanir, sum verða settar í verk á sama hátt hjá fleiri myndugleikum, kann tann neyðuga tøkniliga skjalfestingin, sum nevnd í § 14, stk. 2, nr. 1, avloysast av eini tilvísing til góðkenda íverksetan saman við einari frágreiðing um møgulig frávik.
Stk. 2. Tjóðskjalasavnið ger og almannakunnger eina skrá yvir skipanir, ið, sbrt. stk. 1, kunnu fáa frávik frá ymiskum krøvum um skjalprógving.

**§ 16.**
Um so er, at ein skipan er tikin í nýtslu, áðrenn Tjóðskjalasavnið hevur góðkent hana, kann Tjóðskjalasavnið krevja, at myndugleikin eftirfylgjandi ger ymiskar neyðugar broytingar í skipan og rakstri við atliti at varðveitingarfyriliti.

*Avmarking av góðkendum skipanum við skjølum*

**§ 17.**
Skipanir við talgildari skráseting av upplýsingum um mál og skjøl, men samstundis við goymslu av málum og skjølum á pappíri (e-journalir), skulu deilast upp í tíðarskeið á umleið 5 ár, møguliga við eini 6 mánaðar tillagingartíð.

**§ 18.**
Skipanir við talgildari skráseting av upplýsingum um mál og skjøl, umframt goymslu av málum og skjølum í talgildum formi, verða avmarkaðar á ein av fylgjandi háttum í mun til avhending av skjalasavnsútgávu til Tjóðskjalasavnið:

A: avmarkað tíðarskeið á umleið 5 ár við tíðarskifti
B: løtumynd umleið 5. hvørt ár av øllum málum og skjølum, sum ikki fyrr eru avhendað, somuleiðis øllum metadátum frá tíðini, ið skipanin hevur verið virkin.
C: avhending av lokaðum málum umleið 5. hvørt ár og øllum metadátum frá tíðini, ið skipanin hevur verið virkin.

*Stk. 2.* Við tíðarskifti skilst, at skrásetingarparturin av skipanini og øll mál verða afturlatin. Mál, ið ikki eru liðugt viðgjørd, verða endurstovnað í nýggjum tíðarskeiði, møguliga eftir eini umskaringartíð upp til 6 mánaðir.

**§ 19.**
Avmarking av skjalasavnsútgávu, sbrt. pkt. B ella C, er treytað av, at Tjóðskjalasavnið eftir endaligt eftirlit, sbrt. § 31, gevur loyvi til tess.

*Stk. 2.* Tjóðskjalasavnið kann, eftir endaligt eftirlit, áleggja myndugleikanum at avmarka skipanir við skjølum, við heimild í pkt. A.

**§ 20.**
Avmarking, við heimild í pkt. C, er treytað av, at myndugleikin broytir skjøl, sum hava verið skrásett í skipanini meiri enn 5 ár, til eitt skjalasavnsformat.

**§ 21.**
Týðandi broytingar í eini skipan, ið er góðkend, eru treytaðar av, at framt verður eitt tíðarskifti, og at skjalasavnsútgávan verður avhendað, áðrenn broytingarnar verða gjørdar.
*Stk. 2* Tjóðskjalasavnið tekur, eftir at hava móttikið fráboðan um broytingar, sbrt. § 6, avgerð um, hvørt broytingarnar føra við sær krav um tíðarskifti ella ikki.

*Skipan og rakstur av góðkendum skipanum við skjølum*

**§ 22.**
Í eini skipan við skjølum skal hvørt skjal knýtast at einum máli fyri at tryggja, at øll skjøl, ið hoyra saman í einum máli, skjótt og lætt kunnu finnast.
*Stk. 2.* Tjóðskjalasavnið kann gera undantak frá kravinum um stk. 1.

**§ 23.**
Tað skal í hvørjum máli skrásetast upplýsingar, sum gera tað møguligt at eyðmerkja og finna málini fram, so sum

1) málseyðkenni
2) málsheiti
3) evni frá skipanarliga bygdari skrá, sum lýsir alla skipanina sbrt. málsøkjum stovnsins

**§ 24.**
Fyri hvørt skjal skulu upplýsingar skrásetast, sum gera tað møguligt at eyðmerkja og finna skjalið aftur, so sum

1) skjalaheiti
2) skjaladagfesting
3) fyri inn- og útgangandi brøv: sendari/móttakari
4) goymsluháttur
5) tilknýti til mál

*Stk. 2.* Hvørt skjal skal hava eitt serstakt ID, og tilknýti millum skjøl skal skrásetast.
*Stk. 3.* Um so er, at tilknýtið millum skjøl, sum nevnt í stk. 2, ikki beinleiðis er sett í verk í skipanini, skal myndugleikin, í sambandi við fráboðanina, greiða frá, hvussu tilknýtið verður skrásett í skjalasavnsútgávuni.
*Stk. 4.* Tjóðskjalasavnið kann víkja frá krøvunum í stk. 1.

**§ 25.**
Í eini skipan, ið verður brúkt av fleiri myndugleikum, skal í máls- og skjalaskrásetingini síggjast, hvør av myndugleikunum tað er, ið hevur skrásett.

Tjóðskjalasavnið

**§ 26.**
Myndugleikarnir skulu, saman við fráboðanini, upplýsa, hvørji fílusløg verða goymd í skipanini.

**§. 27.**
Í skipanum við skjølum skal vera søgulýsing av tabellum við upplýsingum um mál og skjøl, - í minsta lagi teir upplýsingar, sum ávíst í §§ 23-24.
*Stk. 2.* Søgulýsingin skal kunna vera ein partur av skjalasavnsútgávuni.

**§ 28.**
Fyri allar skipanir við varðveitingarverdum skjølum skal ein vegleiðing gerast við leiðreglum um at røkja skipanina við fyriliti fyri skjalasavninum.
*Stk. 2.* Vegleiðingin skal innihalda nágreiniliga frágreiðing um:

1) endamálið við og innihaldið í skipanini, og hvussu skipanin hongur saman við øðrum skipanum hjá myndugleikanum
2) vanligar mannagongdir og arbeiðsgongdir í skipanini viðvíkjandi
    - hvussu heiti á málum og skjølum skulu skrásetast
    - stovnan og lokan av málum
    - lýsing og brúki av skrásetingarkervisfrøði, so sum reglur fyri viðlíkahaldi av skrásetingini
    - handfaring av goymsluformati, so sum goymslu av møguligum pappírsskjølum o.ø., sum eru skrásett, men ikki goymd, í skipanini
    - loyvdum fílusløgum
    - ljóslesing ella talgilding av samgildum tilfari í skipanini
    - skipanarbroytingum
    - broytingum í málsøkjum
    - avhending til Tjóðskjalasavnið
3) Góðskutrygging av skráseting í skipanini og eftirlit við skrásetingarsiðvenju.
4) Onnur viðurskifti, sum myndugleikin metir hevur týdning fyri at tryggja gagnliga nýtslu av skipanini.

*Eftirlit og umsjón við góðkendum skipanum og skjølum*

**§ 29.**
Myndugleikarnir skulu hava eftirlit við, um kravdir upplýsingar, sbrt. §§ 23–24, eru rætt skrásettir.
*Stk. 2.* Eftirlitið skal vera lýst í ásetingunum hjá myndugleikanum um nýtslu av skipanini, sbrt. § 28.

**§ 30.**
Myndugleikin skal hava eftirlit við, um skrásett eru onnur fílusløg í skipanini enn tey, sum ávíst í leiðbeiningini, sbrt. § 28.

**§ 31.**
Tjóðskjalasavnið hevur eftirlit við nýtsluni av skipanum við skjølum, sum skulu goymast. Eftirlitið verður framt umleið 2 ár eftir, at skipanin er tikin í nýtslu.

Stk. 2. Eftirlitið snýr seg um kanning av, um skipanin verður nýtt sum lýst í leiðbeiningini, undir hesum um myndugleikin hevur gjørt tað rætta eftirlitið, sbrt. §§ 29 - 30.